## Føroyskur flaggdagur í London

Annað árið á rað skipar donsk kirkja í London fyri flaggdagsgudstænastu. Tað er danska kirkjan í Regents Park, sum sunnudagin tann 24. apríl, dagin undan flaggdegnum, er karmur um flaggdagsgudstænastuna. Hjørdis Kjærgaard leiðir gudstænastuna, sum byrjar klokkan 18:00. Aftaná gudstænastuna er buffet á skránni.

Flaggdagsgudstænastan í London skal eftir ætlan vera eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári, júst tí bretar høvdu ein leiklut í viðurkenningini av Merkinum.

-hkm

## Stuttligt blaðheiti

**Í Noreg hava fólk atkvøtt »www.sosialurin.fo« sum stuttligastu slóðina á alnetinum**

ALNET-SKEMT

Millum mongu atkvøðugreiðslurnar, sum altíð tykjast vera á alnetinum, var ein í Noreg herfyri, har tað ráddi um at finna stuttligasta heitið á heimasíðum hjá fyritøkum.

Og í kapping við nøvn sum Hotel Guggemos, Auto-knull og onnur, varð tað føroyska slóðin, www.sosialurin.fo, sum norðmenn hildu vera ta stuttligastu.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni sæst annars á http://www.sol.no/underholdning/artikkel/firmanavn3152691.html

# Kappingarførir vágamenn

**Trý av fýra teimum lægstu tilboðunum upp á timburarbeiðið upp á nýggja dagstovnin í Sørvági komu úr Vágum**

TILBOÐ
Edvard Joensen

**Sørvági:**
Av teimum 10 tilboðunum, sum komu inn upp á timbur- og snikkarararbeiðið við nýggja dagstovnin í Sørvági, vóru trý av fýra teimum lægstu úr Vágum.

Timburarbeiðið varð boðið út í almennari lisitatión, og 11 feløg bóðu um útbjóðingartilfarið. 10 tilboð komu innaftur, og tey lógu í prísi millum 4,7 og 7,2 milliónir. Tey flestu lógu umleið tær fimm milliónirnar, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági. Han sigur, at meðaltilboðið er 5,2 milliónir krónur.

Bygdarráðið í Sørvági fer helst í vikuni at taka støðu til tilboðini, og væntandi kann arbeiðið byrja um mánaðarskiftið komandi. Ætlanin er so, at hesin parturin skal vera liðugur umleið fyrsta mei næsta ár. Eftir ætlan skal nýggi dagstovnurin so vera klárar at flyta inn í einaferð í august/september 2006, sigur borgarstjórin.




*Børnini, sum ganga í gamla barnagarðinum, Sýsluni, í Sørvági, fylgdu spent við, tá byrjað varð at grava út fyri nýggja dagstovninum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Samlaða gólvvíddin á dagstovninum er góðar 1.100 fermetrar, sigur borgartjórin. Í hesum eru loft og kjallari, sum brúkast skulu til goymslurúm eisini, sigur hann.

Nýggi stovnurin, sum umfatar bæði vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla, fer at hýsa 100 børnum.

# Løgmaður kannar møguleikan fyri tættari samstarv við EFTA

Á vitjan síni í Brüssel, hevur Løgmaður seinnapartin í dag havt fund við aðalskrivaran í EFTA, William Rossier.

Løgmansskrivstovan sigur í tíðindaskrivi, at endamálið við fundinum var at greiða frá framtíðarætlanum Føroya á uttanríkisøkinum.

Løgmaður greiddi, at Landsstýrið í løtuni kannar møguleikan at víðka formliga samstarvið við ES og EFTA.

Løgmaður vísti í hesum sambandi á, at nýggja uttanríkislógin kann gerast rættarliga støðið undir einum tættari samstarvi við ES og EFTA í framtíðini.

Aðalskrivarin í EFTA vísti hesum ikki aftur, og teir báðir vóru á einum máli um at halda fram at kanna møguleikarnar fyri einum formligum samstarvi.

Umframt at hava skift orð við aðalskrivaran í EFTA, hitti løgmaður eisini ES-nevndarlim í landbúnaðarmálum, Mariann Fischer Boel har tey umrøddu framtíðarsamstarv við ES.

Føroyaska sendinevndin í Brüssel er f.v. Ole Samsing fyri danska uttanríkisráðið, Marjun Hanusardóttir, Sigmundur Ísfeld, Jóannes Eidesgaard og Herluf Sigvaldsson

# ES og Føroyar vilja samstarva um svartkjaft

**Føroyar og ES hava eina felags skyldu at loysa trupulleikarnar við ovurfiskingini av svartkjafti**

SAMSTARV

Nú eru vónir um at Føroyar og ES kunnu fara undir eitt felags átak fyri at steðga ovurfiskingini av svartkjafti.

Tað er greitt eftir fund í dag ímillum Jóannes Eidesgaard, løgmann og ES nevndarlimin í fiskivinnu, Joe Borg

Á Brüsselferð síni hitti løgmaður í dag Joe Borg har teir mest tosaðu um trupulleikarnar við ovurfiskingini av svartkjafti.

Løgmaður vísur á, at bæði Føroyar og ES hava stór áhugamál í svartkjaftinum og tí heldur hann, at tað er av alstórum týdningi, at báðir partar í felag virka fyri eini burðardyggari menning av kroysta svartkjaftastovninum.

Eftir fundin verður upplýst av løgmansskrivstovuni, at vit kunnu hava eina varisliga vón um at ES og Føroyar í felag kunnu fáa gongd á læstu støðuna millum londini.

Á fundinum legði løgmaður dent á, at tað er óheppið, at svartkjaftastovnurin í fleiri ár hevur verið ovfiskaður, og tískil var tað óheppið, at ES í desembermánaði gjørdi av at hækka kvotuna á svartkjafti.

Joe Borg og Jóannes Eidesgaard eru samdir um, at málið um svartkjaftin er eitt sera álvarsamt mál, sum ein loysn má finnast á. Teir avráddu tí, at samráðingarnevndirnar hjá Føroyum og ES hittast til tvípartasamráðingar sum skjótast, at tosa um hvussu Føroyar og ES í felag kunnu virka fyri eini loysn á málinum.



*Jóannes Eidesgaard og Joe Borg eru samdir um at tosa meiri um, hvussu ES og Føroyar í felag kunu virka tálma ovurfiskingini av svartkjaftinum*

Føroya Landsstýrið hevur seinastu árini áhaldandi heitt á ES-myndugleikar um at økja kvotuna á rækjum. Á fundinum í morgun varð rækjukvotan aftur umrødd, og ES-nevndarlimurin vísti ikki føroyska ynskinum aftur, og vildi umhugsa støðuna fyri at finna eina nøktandi loysn fyri allar partar.